Skúlastjóri og tónleikari

Hann brúkti seksti ár av lívi sínum í fólkaskúlanum, men hann hevur altí› havt tónleikin vi› sí›una av. Hann hevur havt serligan áhuga fyri klassiskum tónleiki, men ta› enda›i vi›, at hann fór at spæla popptónleik saman vi› næmingum hjá sær. Í morgin ver›ur Alex Sólstein sjeyti ár

EY›UN KLAKSTEIN

Hann fór í fyrsta flokk sum sjey ára gamal í 1937, og hann var› ikki li›ugur í skúlanum fyrr enn seksti ár seinni, í 1997.

Alex Sólstein hevur brúkt alt sítt arbei›slív í føroyska fólkaskúlanum, og hóast hann nú ver›ur sjeyti ár, eru ta› bara tr‡ ár sí›ani, at hann fór úr skúlanum for good.

– Tá eg kom á lærarastovuna av fyrstan tí›, tosa›u lærarnir um, at teir vistu ikki, hvussu teir n‡ggju lærararnir, sum ongantí› høvdu veri› til skips, fóru at roynast. Eg umbo›a›i eitt n‡tt ættarli›, sum bara hev›i gingi› í skúla, grei›ir Alex Sólstein frá.

Hann byrja›i sum lærari í Klaksvík 1962, og átta ár seinni gjørdist hann skúlastjóri. Tá var hann tann yngsti skúlastjórin, sum nakrantí› hev›i veri› í danska ríkinum.



Tónleikur ahevur altí› spælt ein t‡›andi leiklut í lívinum hjá Alexi Sólstein, og nú hann er pensjónera›ur skúlastjóri, eru stundirnar betri til at takast vi› ítrívi›.

Mynd: SJH

Kúlurnar komu nær

Alex Sólstein er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Bæ›i foreldur hansara vóru úr Klaksvík, og ta› er eisini har hann hevur brúkt meginpartin av lívi sínum.

Skúlatí›in hjá honum var merkt av krígnum, og Alex kom eisini sjálvur at standa andlit til andlit vi› krígshendingarnar.

– Ein dagin í oktober 1940 vóru eg og ein vinma›ur á veg heim frá skúlanum. Tá kom ein t‡skur flúgvari inn yvir Klaksvík. Hann tveitti eina bumbu og fleyg sí›ani sera lágt yvir bygdini, me›an hann alla tí›ina skjeyt vi› maskinbyrsu.

– Vit vóru skelka›ir, men eisini forvitnir, og tí stó›u vit og hugdu eftir flúgvaranum, og vit sóu t‡›uliga menninar, sum vóru umbor›. Eftir hendingina sóu vit, at ein kúla hev›i rakt ni›ur í vegin beint frammanfyri okkum, og ein kúla var farin strúkandi í ein húsvegg naka› omanfyri okkum. Ta› havi eg ofta hugsa› um sí›ani.

– Sum børn merktu vit óttan undir krígnum, men í grundini kendu vit okkum trygg sum børn hóast ta›. Ta› var ein heilt serlig tí›, og atmosferan í bygdini var eisini ø›rvísi, enn hon var seinni, sigur Alex Sólstein.

Reglubundi› arbei›i

Tá Alex var li›ugur vi› fólkaskúlan, fór hann til Havnar at taka studentsprógv. Ta› fekk hann í 1950, og tvey ár seinni fekk hann lærarаprógv.

– Eg gjørdist lærari í Klaksvík í august 1952 og fekk serliga til uppgávu at hava fremmandamál - dansk, enskt og t‡skt, sigur Alex Sólstein, sum lættliga skiftir millum tey ymsu málini, sum hann dugir at tosa til fulnar.

Eftir at hann hev›i veri› tvey ár ni›ri á Danmarks Lærerhøjskole fyri at fáa meira undirvísing í máli, kom hann aftur til Klaksvíkar at vera lærari í 1959. Sí›ani gekk bara eitt ár til hann gjørdist skúlastjóri.

– Hetta var samstundis, sum vit fingu n‡ggjan skúla, og um ta› mundi›, tá n‡ggj fólkaskúlalóg kom, so ta› var ein sera stór avbjó›ing hjá mær at skipa skúlan eftir n‡ggju skipanini, grei›ir Alex frá.

– Læraraarbei›i› er rættiliga reglubundi›, og tí kn‡ta seg kanska ikki tær serligu hendingarnar til ta›. men sum lærari hevur ta› t‡dning, at tú ert til sta›ar, tá børnini eru í skúla, og at tey fáa ta undirvísing, sum tey hava fyri ney›ini, sigur Alex Sólstein.

Skúlin b‡ttur sundur

Mi›skei›is í sjeytiárunum vóru næstan 1000 fólk kn‡tt at skúlanum í Klaksvík. 960 næmingar gingu í skúla, tá ta› var mest, og afturat hesum kom sjálvandi starvsfólki› í skúlanum.

– Eg mælti til, at skúlin var› b‡ttur sundur, tí ta› var sera trupult at hava yvirlit yvir alla gongdina í skúlanum, tá ta› vóru so nógv fólk, og virksemi› var í so nógvum ymsum hølum, sigur Alex Sólstein.

Og ta› var eisini ta› sum hendi í 1979. Tá var› stóri skúlin b‡ttur í tvey, og sí›ani hava tveir fólkaskúlar veri› í Klaksvík. Alex Sólstein gjørdist stjóri í skúlanum vi› Ósánna, og har var› hann verandi til 1997. Seinastu árini av hesum tí›arskei›i hev›i hann farlovyi frá starvinum og var lei›ari av eftirútbúgvingini hjá lærarunum.

– Ta› gjørdi ta› lættari at gevast í skúlanum, tí á tann hátt gavst eg so lí›andi í skúlanum. Nú havi eg lagt skúlan afturum meg, og eg má siga, at eg fylgi líti› vi› í, hvat gongur fyri seg í skúlanum nú, sigur hann.

Nógvur tónleikur

Mong fólk kring landi› kenna fyrst og fremst Alex Sólstein sum tónleikara. Hann spælir í Føroya Symfoniorkestri, og hevur ver›sjónligur i tí parti av tónleikaheiminum, sum fæst vi› klassiskan ella symfoniskan tónleik.

– Ta› var nógvur tónleikur í heiminum hjá ommu. Ein mammubeiggi og mostur spældi nógv, og klaver var eisini í heiminum. Ta› var í tí›ini á›renn grommofonplátuna. Vit hoyrdu eitt sindur av tónleiki í útvarpinum, men fyrst og fremst syrgdu vit sjálvi fyri okkara tónleikaundirhaldi, sigur Alex.

Alex fór tí›iliga at spæla violin, men hann hevur ikki bara hildi› seg til violinina. Hann kann eisini lættliga vi› klaveri›, hann spælir horn og hann syngur.

Alex var vi› til at stovna Føroya Symfoniorkestur í 1984. Hann hevur siti› í nevndini sí›ani, og hann hevur eisini alla tí›ina veri› ein av tónleikarunum í orkestrinum.

– Nú eg eri pensjónera›ur, havi eg betri stundir at taka mær av ymsum uppgávum hjá Symfoniorkestrinum, har eg eri nevndarlimur, skrivari og kassameistari, sigur hann.

Spældi popp saman vi› næmingum

Tónleikurin hevur spælt ein t‡›andi leiklut í lívinum hjá Alexi.

– Arbei›i› hjá mær hevur veri› skúlin, og frítí›arítrivi› hevur veri› tónleikur av ymsum slagi, sigur hann.

Framvegis spælir hann nógv. Hann spælir kamartónleik tvær fer›ir um vikuna, hann venur eisini tvær fer›ir um vikuna vi› Klaksvíkar Hornorkestri, har hann hevur spælt farnu fimti árini, og javnan eru ta› eisini uppgávur vi› Føroya Symfoniorkestri.

Ta› er fyrst og fremst klassiskur tónleikur, sum Alex hevur havt vi› at gera. Hann hevur eisini spælt undirhaldstónleik, men popptónleikurin hevur ongantí› sagt honum naka›.

– Eg var til dømis ongantí› bitin av The Beatles, og popptónleikurin sigur mær einki. Mær dámar ikki, at ta› alla tí›ina skal ver›a eitt regluligt beat aftanfyri, og at bassurin skal ver›a so dominerandi.

– Men uppgávurnar í Føroya Symfoniorkestri eru nógvar, og ta› enda›i vi›, at eg kom at spæla popptónleik saman vi› næmingum hjá mær, sigur Alex og sipar til konsertirnar, sum Frændur og Symfoniorkestri høvdu saman í fjør.

Heldur tónleik enn ítrótt

– Eg eri fegin um, at eg valdi tónleikin sum ítrív heldur enn ítróttin, tí tónleik kanst tú spæla alt lívi›. Ta› er trupult at spæla fótbólt sum 70 ára gamal, sigur hann.

– Men hóast eg ongantí› hev›i nakran áhuga fyri at í›ka ítrótt sjálvur, er ta› ikki verri enn so, at eg eri ein av teimum, sum trúfastur fari til allar heimadystirnar hjá KÍ, leggur hann afturat.

Tann pensjónera›i Alex Sólstein hevur ikki sett seg vi› køksbor›i› í fri›i og ná›um at hyggja út ígjøgnum vindeyga›. Nei, hann hevur framvegis nógv at takast vi›, og nú er ta› serliga frítí›arítrívi› - tónleikurin - sum hann brúkar tí›ina til.

Og hann er ikki bangin fyri at brúka n‡ggjastu tøknina, tá hann skal loysa uppgávur av ymsum slagi. Teldan er hent arbei›sambo›, og ta› eru teldupostur, internet og skannari eisini.

Hann er skúlastjórin, sum hevur hitt 45 árgangir av klaksvíkingum í skúlanum, og í morgin ver›ur hann sjeyti ár.

Pegasus í ringrás

Sunnukvøldi› fer Studio Pegasus í ringrás vi› eini f‡ra tíma langari sending í Útvarp Føroya

Sunnukvøldi› klokkan 20.00 fer Útvarp Føroya at hava senda ein f‡ra tíma langa sending úr Studio Pegasus í Klaksvík.

Pegasus hevur seinastu mána›irnar sent hvørt kvøld í Útvarpi Føroya, men sunnukvøldi› er ein serlig sending á skránni. Talan er um Ringrás, har nógv er á skránni.

Millum anna› ver›ur hugt eftir samfer›sluni millum Klaksvík og meginøki, og tosa› ver›ur millum anna› vi› fólk bá›umegin Lorvíksfjør›. T‡sdagin vóru ta› li›in 30 ár sí›ani flogvanlukkuna í Mykinesi. Tosa› ver›ur vi› tryluskipara, sum vann sær dirvismerki fyri avgerandi leiklut sín í bjargingararbei›num.

Sendingin ver›ur krydda› vi› vi› tónleiki, bæ›i á plátum og fløgum, og so fara millum anna› Torkil Mørkøre og Vísumenn at vitja beinlei›is musikkcaféina.

Vertir eru Ey›un Klakstein og Gunnar Nolsøe, me›an Fró›i Løkságar› ver›ur at hoyra úr b‡num.

Sunnukvøldi› í Útvarp Føroyar frá klokkan 20.00 til midnátt.

Fró›i Løkságar›, Gunnar Nolsøe og Ey›un Klakstein skipa fyr sendingini Ringrás í ÚF sunnukvøldi›.

Mynd: Nor›l‡si›